# Pensjónsnýskipan 2012

***– ein haldfør pensjónsskipan***



*Talið av eldri fólki í Føroyum er skjótt veksandi, meðan talið av arbeiðsførum verður nærum óbroytt. Hetta fer at seta føroysku pensjónsskipanina og vælferðartænasturnar undir stórt trýst.*

Mars 2011

# Innihald

1. Framskrivingar – Tí er ein nýskipan neyðug
2. Politisk viðgerð
3. Bundin persónlig samansparing
4. Almannapensjón
5. Fíggjarlig ávirkan hjá einstaka pensjónistinum
6. Búskaparliga ávirkanin av pensjónsnýskipanini



# Demografiskar framskrivingar




| | Væntað livitíð hjá 60 ára gomlum | Ár sum pensjónistur |
|---|---|---|
| **1971-75** | 79,0 | 12,0 |
| **2001-05** | 82,0 | 15,0 |
| **2045-50** | 86,5 | 19,5 |

# Árliga hallið á fíggjarlógini verður 1,3 mia. kr.

| | Eldraútreiðslur Í mió. kr. | Eldraútreiðslur í % av BTÚ | Hall á FL hvørt ár |
|---|---|---|---|
| 2012 | 1.359 | 10,46 | - |
| 2020 | 1.658 | 12,76 | 299 |
| 2030 | 2.088 | 16,06 | 729 |
| 2040 | 2.577 | 19,82 | 1.217 |
| 2050 | 2.642 | 20,33 | 1.283 |

- Skattatrýstið er nú umleið 50 % av BTÚ. Um einki verður gjørt, so veksur skattatrýstið upp til 60 % av BTÚ.
- Eldraútreiðslurnar fevna um útreiðslur til fólkapensjónir, SAMEG, almannaútreiðslur og heilsuútreiðslur.

# Tryggja framtíðar vælferð í Føroyum

Fyri at tryggja vælferðarsamfelagið í framtíðini hava politisku flokkarnir viðgjørt pensjónsnýskipanina:

- Øll skulu spara saman til egna eftirløn. Hetta er eitt av høvuðselementunum fyri at tryggja eina pensjónskipan, sum er haldfør, tá talið av eldri fólki veksur.

- Broytingar verða gjørdar í almannapensjónunum, soleiðis at fólk við góðari inntøku frá arbeiði og eftirlønarsamansparing ikki fáa so nógv frá almennu kassunum. Fólk við ongari samansparing fara framvegis at fáa fulla pensjón frá tí almenna.

- Ein minni vøkstur í fólkapensjónsútreiðslunum gevur landskassanum møguleika at økja útreiðslurnar til vælferðartænastur í eldrarøktini, sum ellisheim, heimahjálp og heilsutænastur til eldri.

# Bundin persónlig eftirlønarsamansparing

1. 15% av inntøkuni skal gjaldast til eftirløn. Byrjað verður við 1,5 % í 2012.
2. Tryggingar kunnu eisini keypast við skattafrádrátti. Málið er, at minst 2/3 av inngjaldinum fer til samansparing.
3. Eftirlønarsamansparingin kann í fyrsta lagi koma til útgjaldingar frá og við almenna pensjónsaldrinum og í seinasta lagi við 70 ára aldur.
4. Av samansparda virðinum kann í mesta lagi 10 % gjaldast út sum kapitalútgjald. Kapitalútgjald verður skattað við 45%.
5. Av restini skal í minsta lagi 50% nýtast til eina lívlanga veiting og í mesta lagi 50% til eina ratueftirløn yvir í minsta lagi 10 ár.
6. Samansparingin fer fram hjá føroyskum eftirlønarveitara (tryggingarfelagi, eftirlønarkassa ella peningastovni) eftir egnum vali.
7. Tað er loyvt at gera sjálvbodna samansparing omanfyri 15%. Samansparingin fær sama skattafrádrátt sum lógarbundna samansparingin og útgjaldið fer fram eftir somu reglum sum tann lógarbundna samansparingin.
8. Samansparingin er persónlig og hevur einki við landskassan at gera.

# Útlendskir eftirlønarveitarar

- Tey, sum eru fødd áðrenn 1. januar 1957 (fólk, sum eru 55 ár og eldri) og sum hava eftirlønarskipan hjá donskum eftirlønarveitara, kunnu halda fram at gjalda til donsku skipanina

- Øll onnur skulu hava eftirlønarskipan í Føroyum (fyri inngjøld frá og við 2012)



# Ítøkilig tiltøk hjá løntakarum og arbeiðsgevarum

Løntakari (um hann ikki hevur eftirlønarskipan):

- Venda sær til arbeiðsgevara og gera avtalu um eftirlønargjald og um býti av eftirlønargjaldi.
- Venda sær til góðkendan eftirlønarveitara og stovna eftirlønarskipan.
- Boða arbeiðsgevara frá, hvar eftirlønin skal gjaldast.

Arbeiðsgevari:

- Venda sær til løntakarar, sum gjalda minni enn 1,5 % til eftirløn, og gera avtalu um býti av eftirlønargjaldi.
- Flyta í minsta lagi lógarkravda prosentið til eftirløn hjá løntakarum.
- Fráboða eftirlønarskipan gjøgnum heimasíðu hjá TAKS (Vinnuportalin).
- Fyrireika seg til at hava fólk til arbeiðis, sum eru yvir 66 ár, kanska við at góðtaka at tey arbeiða minni enn fulla arbeiðstíð.

# Inngjald í 2012

Inngjald í 2012 hjá vanligum løntakarum:

- Eftirlønargjaldið verður innkravt við afturhaldsskipanini hjá TAKS og verður flutt til góðkenda eftirlønarskipan hjá løntakaranum.
- Lønin kann ikki flytast um afturhaldsskipanina, um ikki løntakarin hevur gjørt avtalu um eftirløn við arbeiðsgevara og eftirlønarveitara.
- Lønin kann ikki flytast um afturhaldsskipanina, um ikki í minsta lagi 1,5 % verður goldið til eftirlønarendamál.

Inngjald í 2012 hjá sjálvstøðugum vinnurekandi/B-inntøkur :

- Gjalda inn sambært forskotsskrásetta inntøku.

# Ein fólkapensjón

- Grundupphædd, viðbót og viðbót til ávísar pensjónistar verða lagdar saman til eina fólkapensjón.
- Fólkapensjónin verður skattskyldug og upphæddin verður bruttofiserað.
- Arbeiðsinntøka og eftirlønarinntøka verður mótroknað í fólkapensjónini, men ikki í samhaldsfasta. Í eini skiftistíð fram til 2017 verður ein minsta upphædd varðveitt, sum ikki kann mótroknast í.
- SAMEG verður hækkaður frá 2.600 kr./mð. í dag til 3.000 kr./mð. frá 2011. Hækkingin verður goldin við at hækka gjaldið til SAMEG við 0,25%.

| | Grund-upphædd /Minsta upphædd | Viðbót /Fólka-pensjón | Viðbót t. áv. pens. | SAMEG | Tils. um árið | Tils. eftir skatt um mð. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Stakur (Verandi) | 50.028 | 38.268 | 7.416 | 32.280 | 127.992 | 9.695 |
| Stakur (Eftir) | 78.000 | 57.240 | 0 | 36.900 | 172.140 | 9.941 |
| Gift (Verandi) | 39.756 | 29.616 | 3.708 | 32.280 | 105.360 | 8.020 |
| Gift (Eftir) | 54.000 | 46.512 | 0 | 36.900 | 137.412 | 8.273 |

# Skiftisskipan fyri mótrokning

**Mótrokning:**

- Mótrokningarfría upphæddin lækkar frá 60.400 kr./ár í 2011 til 30.000 kr./ár í 2020. Samstundis lækkar mótrokningarprosentið frá 60% niður í 30%.
- Skiftisskipan fyri mótrokningina verður galdandi frá 2011 til 2020.
- Frá 2020 er mótrokningarskipanin komin á mál. Tá verður mótroknað við 30 % av allari inntøku yvir 30.000 kr./ár.
- Eitt lágt mótrokningarprosent tryggjar ein rímiligan marginalskatt hjá pensjónistum. Við verandi skipan er samlaða mótrokningar- og skattaprosentið 75 %. Í 2020 er samlaða mótrokningar- og skattaprosentið komið niður á 59%.

| | Mótrokning | Av inntøku yvir |
|---|---|---|
| 2011 | 60 % | 60.400 |
| 2012 | 50 % | 59.000 |
| 2013 | 45 % | 58.000 |
| 2014 | 45 % | 56.000 |
| 2015 | 40 % | 54.000 |
| 2016 | 40 % | 52.000 |
| 2017 | 40 % | 50.000 |
| 2018-2019 | 35 % | 40.000 |
| 2020 og frameftir | 30 % | 30.000 |




So hvørt sum egininntøkan hjá pensjónistinum veksur(grøna arealið), so minkar almannapensjónin (sólgula arealið). Pensjónisturin fær altíð fulla upphædd frá SAMEG(bláa arealið). Samlaða inntøkan hjá persónum veksur javnt og uttan lop – t.e. persónurin fær altíð vinning av at hava eina eyka inntøku frá arbeiði ella egnari eftirløn.




Teir bláu stabbarnir vísa, hvussu tøka inntøkan hjá einum pensjónisti broytist við pensjónsnýskipanini í 2012.




Teir bláu stabbarnir vísa, hvussu tøka inntøkan hjá einum pensjónisti broytist við pensjónsnýskipanini 2012.

# Javning av pensjónum

Fólkapensjónin verður javnað við gongdini í lønum og prísum.

Frymil til javning:

Javning fólkapensjón = 0,5 * lønargongdini + 0,5 * prísgongdini

- Gevur javningarútrokningin negativt úrslit, so verður ongin javning framd. Javnað verður aftur, tá javningarútrokningin kemur upp um støðið, sum hon hevði verið, um hon fyrst varð javnað niður og síðani upp aftur.
- Javnað verður ikki við meira enn lønarhækkingini.

• Javnað verður fyrstu ferð í 2012.

# Onnur tiltøk

- Avtøka av mótrokning millum hjúnarfelagar.

- Psykiskt sjúk á stovni, sum í dag fáa lummapengar, fáa rætt til pensjón.
- Búfólk undir trivnaðartænastuni, sum í dag fáa lummapengar, fáa rætt til pensjón.
- Fyritíðarpensjónistar á ellisheimum, sum í dag fáa lummapengar, fáa rætt til fyritíðarpensjón.
- Fólkapensjónistar á ellisheimum, sum í dag fáa lummapengar, fara at fáa fólkapensjón.

- Øll fara tey nú at gjalda fyri uppihald á stovninum.

- Eykaskattur á háinntøkur heldur fram til 2014.

# Pensjónsaldurin

**Pensjónsaldurin verður ikki viðgjørdur á hesum sinni.**

Politiska fylgibólkurin hevur gjørt soljóðandi semju:

> “*Ætlanin er, at politiski fylgibólkurin skal arbeiða víðari seinni við pensjónsaldrinum, m. a. at arbeiða við virknum eldrapolitikki og við at gera tað lættari hjá fólki at fáa eitt meira smidligt og stigvíst skifti frá arbeiðslívinum til pensjónistalívið.*”




*Eldraútreiðslurnar verða 1.283 mió. kr./ár størri um onki verður gjørt.*

*Nýskipanin klárar at minka útreiðsluvøksturin við uml. 700 mió. kr., so eldraútreiðslurnar eftir nýskipanina "bert" veksa við uml. 590 mió. kr.*

| | **2010** | **2020** | **2030** | **2040** | **2050** |
|---|---|---|---|---|---|
| Eldraútreiðslur áðrenn nýskipan | 1.359 | 1.658 | 2.088 | 2.577 | 2.642 |
| Vøkstur | | *299* | *729* | *1.217* | *1.283* |
| Netto inntøku- og útreiðslubroyting av nýskipan | | 64 | 227 | 483 | 692 |
| Eldraútreiðslur eftir nýskipan | 1.358 | 1.594 | 1.862 | 2.094 | 1.951 |
| Vøkstur | *0* | *234* | *502* | *734* | *591* |
| **Prosent av vøkstri sum minka burtur við nýskipan:** | | 22% | 31% | 40% | 54% |